# Ársfrágreiðing fyri Vísindasiðseminevndina 2019

Vísindasiðseminevndin er sett við heimild í "Lov om et videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter", sum varð sett í gildi við kongligari fyriskipan nr. 961, 15. juli 2013.

Nevndin hevur sjey limir, fýra leikfólk og trý fakfólk við granskingarroyndum innan heilsuvísind.

Limirnir í 2019:

- Jens Andreassen, formaður, lækni og granskari
- Gunnhild Helmsdal, lækni og granskari
- Ann E. Østerø, leiðari á Diagnostiska Deplinum, LS
- Oluf Færø, næstformaður, cand. scient
- Kári Purkhús, lívfrøðingur
- Gunnvør á Norði, lívfrøðingur, granskari
- Armgarð Arge, cand. theol. og tíðindakvinna

Skrivari: Ann E. Østerø

Avgerðir hjá føroysku vísindasiðseminevndini kunnu kærast til NVK (Nationale Videnskabsetiske Komité) í Danmark. Sami kærumøguleiki er fyri avgerðir tiknar av staðbundnu vísindasiðseminevndunum í Danmark.

Endamálið hjá Vísindasiðseminevndini er at tryggja, at heilsuvísindaligar granskingarverkætlanir eru skipaðar á vísindasiðsemiligum tryggum grundarlagi. Sum grundregla skulu rættindi og tryggleiki hjá royndarpersóninum takast framum vísindalig og samfelagslig áhugamál í heilsugransking.

Umframt lóggávuna fyriheldur nevndin seg til almennu meginreglurnar hjá NVK, soleiðis sum tær eru tøkar á heimasíðuni www.nvk.dk.

## *Fundir og umsóknir*

Nevndin hevði 7 fundir í 2019 og viðgjørdi 19 umsóknir. Harav vórðu 11 umsóknir góðkendar, 3 verkætlanir fingu longda freist, og við 4 umsóknir varð staðfest, at tær ikki kravdu viðgerð í nevndini.
Í hvørjum einstøkum føri kom nevndin til eina felags niðurstøðu. Ongin niðurstøða kravdi atkvøðugreiðslu í nevndini.

5 av 19 umsóknum kravdu longri enn 60 daga viðgerð.

## *Góðkendar verkætlanir í 2019*

1. *"Skeletal muscle fatty acid oxidation in patients suffering from carnitine transporter deficiency and, the regulation of carnitine uptake in human skeletal muscle"*
2. *"Meningokokksjúka í Føroyum"* (Leinging)
3. *"Familiær Hypercholesterolæmi"* (Ískoytisverkætlan)
4. *"Psoriasis"* (Leinging)
5. *"Impact of angiotensin converting enzyme ACE activity on exercise training sensitivity"* (Broyting)
6. *"PDE8A"* (Leinging)
7. *"FarGen II"*
8. *"FarGen kontrollpersónar til ADHD verkætlanina"*
9. Ískoytisverkætlan til *"ADHD ílegukanning"*
10. *"Improvement of neonatal screening for treatable genetic conditions and evaluation of carrier frequency for lethal disorders in the Faroe Islands"* (Broyting)
11. *"Familiær Hypercholesterolæmi"* (Ískoytisverkætlan)
12. *"Viðkvæmi í barnaárum fyri immuntálmandi dálkingarevnum"*
13. *"Ávirkan av langtíðarvenjing í blóðstorknan hjá sjúklingum við hjartaæðrasjúku"*
14. *"Ung, kostur og rørsla"*

## *Virksemi og netverkan*

Eins og undanfarin ár, kann nevndin staðfesta, at tað áhaldandi er týdningarmikið at hava siðsemiligu eyguni vend á luttakarar í granskingarverkætlanum. Hetta fyri at verja luttakarar móti keðiligum avleiðingum, sum kunnu koma fyri í hesum tíðum, har eitt nú genomlesingar gerast alsamt meira vanligar.

Tað er sostatt týdningarmikið, at limir í Vísindasiðseminevndini eru við í tiltøkum uttanlands, sum hava til endamáls at lýsa og viðgera vísindasiðsemiligar avbjóðingar í samband við granskingarverkætlanir.

Í hesum sambandi hevur formaðurin luttikið á fundum hjá National Videnskabsetisk Komité sum eygleiðari.

Eisini hevur formaðurin og nevndarlimur luttikið á árligu norðurlendsku ráðstevnuni, "Nordic Secretary Meeting", sum Oslo hesaferð var karmur um. Eitt av nógv umrøddu evnunum á hesi ráðstevnu hesaferð var ein felags "Norðurlendskur Granskingarportalur", sum hevur til hyggju at gera tað greiðari og lættari hjá granskarum at søkja um loyvi til heilsuvísindaligar granskingarverkætlanir í norðanlondum. Hetta serliga orsakað av, at talið av luttakarum til nógvar verkætlanir er lágt, so tað kann hava týdning fyri at fáa neyvari granskingarúrslit.
Hugsanin er, at granskari bert skal søkja á einum staði, og síðan verða umsóknirnar býttar út til rætta land ella vísindasiðseminevnd, sum skal geva loyvi til heilsuvísindaligu granskingarverkætlanina.

Svøríki hevur tikið uppgávuna, at fáa byrjað arbeiðið við felagsportalinum, uppá seg.

Næstformaðurin hevur eins og undanfarin ár havt framløgu fyri lesandi á Fróðskaparsetrinum um galdandi vísindasiðsemiliga lóggávu og givið góð ráð í samband við ætlan um granskingarverkætlanir.

Vinaliga

Ann E. Østerø
Skrivari í Vísindasiðsemisnevndini